## Henrik misti sigurin



Køge, har Henrik Larsen er venjari, misti í gjár sigurin í evstu løtu, tá ið liðið spældi ímóti Herfølge á heimavølli. Søren Nielsen legði Køge á odda 1-0, og líkt var til, at hetta skuldi gerast einasta málið í dystinum, har Køge hevði leikliga yvirvág allatíðina. Men í yvirtíðini eydnaðist tað Herfølge at skora, so at dysturin endaði við javnleiki 1-1. Køge liggur fram við eftir einum uppflytingarplássi í 1. deild, men javnleikurin í gjár kann gerast ein avgerandi forðing fyri uppflyting.

## Fowler gevst í Liverpool

Tann aldrandi áleyparin í Liverpool, Robbie Fowler, hevur í ár ikki havt sítt besta kappingarár í Liverpool. Hetta fær nú avleiðingar, tí fyrr í vikuni greiddi venjarin á liðnum honum frá, at hann ikki fær sín sáttmála longdan við felagið. Umframt Robbie Fowler má Jerzy Dudek eisini siga farvæl við felagið. Eiheldur hann hevur fingið sáttmálan longdan. Seinasti dystur hjá Robbie Fowler var í gjár, og tað var dystur nummar 369 hjá honum fyri Liverpool. Fowler hevur skorað 183 mál fyri Liverpool.



*Eina løtu hevði VB/Sumba eitt gott trýst. Men misnýtta brotssparkið tók luftina úr liðnum – og so gjørdi Clayton Soares restina*
*Mynd: Áki Bertholdsen*

VB/Sumba-B71 1-4 (1-1):

# Clayton sendi VB/ Sumba í kjallaran

*VB/Sumba*

*B71*

**Vertirnir misnýttu gyltan møguleika at leggja seg á odda. Og so tók Clayton Soares fullkomuliga yvir, tá hann við einum reinum hat-trick negldi VB/Sumba fast í botnin**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Átta tap á rað. Tað er status hjá VB/Sumba, nú fyrsti triðingurin av landskappingini er lagdur aftur um bak. Ikki síðani heimasigurin á AB í fyrsta umfarinum av Formula-kappingini hevur suðuroyarliðið vunnið sær stig, og greiða tapið fyri B71 negldi í so máta enn ein seym í kistuna.

Uttan leikbannaðu Birgir Jørgensen, Martin Tausen og Biorna Kærbech var tað kortini eitt væl tendrað VB/Sumba, sum fór á vøllin. Fyrstu longu løtuna høvdu teir eitt tak á B71, og tað var eisini í tráð við leikbýtið, at Hallur Dam Joensen legði vertirnar á odda eftir hálvum tíma.

VB/Sumba hevði eisini møguleikar at økja um leiðsluna, men beint fyri steðgin fingu teir sum vátan vøtt. Clayton Soares skuldi vísa seg at verða stóri maðurin hendan dagin, og hann átti eisini sín leiklut, tá hanns pældi Jóhannes Jensen púrasta blankan, so hesin kundi javna.

### Misnýttu brotsspark

Mangt kundi helst sæð øðrvísi út, hevði VB/Sumba gagnnýtt møguleikan, sum teir fingu tíðliga í seinna hálvleiki. Brotsspark varð dømt, og Acu Pandurovic varð settur at skjóta. Tað eydnaðist tó Símun Rógva Hansen at verja fyri, og meira ella minni tóktist hetta taka luftina úr vertunum.

Og so syrgdi Clayton Soares annars fyri restini. Hann skoraði til 2-1, tá Wellington legði bóltin innfyri. 3-1 gjørdist tað, tá Clayton langaði til bólt, sum Símin Hansen hevði lagt útfrá. Og tá VB/Sumba seinastu løtuna spenti bogan, kundi Clayton hegnisliga enda kontra-álop við at lyfta upp um Vlada Filipovic í málinum. Beint undan hesum varð Fabio Vieira rikin av vølli eftir tvey gul kort, men hetta fekk altso onga ávirkan á úrslitið av dystinum sum so.

### Negldir í botnin

Við bara trimum stigum eftir fyrsta triðingin av kappingini, tykist støðan hjá VB/Sumba rættiliga vónleys. Sjálvandi er matematiski møguleikin væl og virðiliga til staðar, men við sjey stigum upp til áttanda plássið er uppgávan alt annað enn løtt.

Hjá B71 stendur hinvegin munandi betri til. Liðið hevur nú 11 stig, og tó at kappingin enn ikki er avgjørd, so tykist ein møgulig niðurflytingarhóttan í løtuni rættiliga fjar.

# Samanlegging er neyðug

**Í VB/Sumba eru ongar ætlanir um panikkloysnir. Venjarin situr enn tryggur, men ein samanlegging er neyðug, um Suðuroyggin framvegis skal spæla við í fremstu røð, sigur Bjarni Johansen, formaður**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tapið fyri B71 á heimavølli staføesti av álvara støðuna hjá VB/Sumba. Bara trý stig eru fingin fyrstu níggju umførini, og tað er eingin loyna, tey í felagnum ikki eru nøgd um hetta.

- Sjálvandi eru vit ikki tað. Serstakliga eri eg vónbrotin av, at úrtøkan móti hinum liðunum í niðaru helvt av talvuni hevur verið so vánalig. Og helst skuldu vit havt eini 8-9 stig nú, sigur Bjarni Johansen, formaður í VB/Sumba.

Tá gongdin er, sum hon hevur verið, so er ikki ónáttúrligt, at tos um nýggjar spælarar og møguliga venjara er at hoyra, men í so máta tykist Bjarni fullkomuliga avkláraður.

- Fyrst og fremst, so er avmarkað, hvat vit fáa gjørt. Nýggju reglurnar gera, at tað verður ikki fyrr enn í summar, at vit kunnu knýta nýggjar spælarar at felagnum, og tí spurninginum arbeiða vit við. Sjálvandi kundi felagið lagt meira fyri í vetur, men tað er so ikki gjørt. Og tá hendan nevndin kom til, vóru ikki nógvir dagar at handla í. Sjálvandi kundu vit eisini valt at sekkja venjaran, men eg dugi ikki at síggja, hvat tað í sjálvum sær skuldi loyst, so tann spurningurin er heldur ikki aktuellur, sigur Bjarni.

### Samanlegging má til

Umframt at arbeiða við at styrkja hópin, so metir Bjarni, at gongdin seinnu árini hevur gjørt ein samanlegging av fótbóltsfeløgunum í oynni alt meira neyðuga.

- Tað er einasta loysnin, um vit framvegis skulu spæla við í fremstu røð. Eitt ávíst samstarv hevur verið, og í dag eru øll tey yngru liðini sett saman við spælarum frá allari oynni. Tí er tað beinleiðis lætturligt, at hesir skulu fara til hvør sítt felag, tá komið verður til vaksnu røðirnar. Fyrst og fremst, so er tað hetta, sum vit arbeiða við í nevndini, og so fáa vit at síggja, hvussu langt hetta ber, staðfestir Bjarni Johansen.